# DAGFØR TEG HALT SOSIALIN

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin **ókeypis** restina av hesum ársfjórðinginum

sosialurin

Tíðindablaðið **sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin
*ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.



*Allar støddir*
- **Rundsagabløð**
- **Diamantskivur**
- **Skeriskivur**

*Vit hvessa eisini*



**Tórshavnar Maskinhandil**
v/Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn • Tel. 313442



**Føroya største úrval av PAKKITILFARI**
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
- Plastbakkar
- Pakkibond, tape
- Merkir, etikettir
- Knívar
- Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
- Ymisk tól til ídnaðin
- Reingerðisevnir
- Tilsetningsevnir
- Plattar
- Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

FARPACK
*Staravegur 5, P.O. Box 171*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*


# Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Lærugreinaráðgevar

**Starvið**
Í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum/Landsmiðstøðini fyri Undirvísingarambeð eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2000.

Ráðgevingin fatar um øll lærugreinaøkini í fólkaskúlanum, skúlabókasavnið og KT-økið. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum høpi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir – eisini tvørtur um lærugreinaøkini.

Samanlagt eru 81 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 8 til 12 lønartímum um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fevnir um. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava hollan førleika á KT-økinum, og væntað verður, at teir eru hugaðir at nýta KT í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevin verður sett/settur eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið sett/settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. apríl 2000.

Gjøllari upplýsingar fáast frá leiðaranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Landsmiðstøðin fyri Undirvísingarambeð**

***Undirvísingar- og mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.* ***Landsmiðstøðin*** *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarambeð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við UMMS eina lærugreinráðgevaskipan og skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum*


**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
**Tlf. 319192**


## Kollafjarðar Bókasavn

**Kvøldseta við frásagnum um Miðgerðaættina** verður í Kollafjarðar Skúla fríggjakvøldið 10. mars kl. 19.00.

**Kollafjarðar bygdarsavn, Fornminnafelagið í Kollafirði og Kollafjarðar Bókasavn**


**JÄSPI KETLAR**
*Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**
Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

**MARIA POULSEN & CO**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Sosialurin - 311820

*Tosið við okkum!*
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008



**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**



**SAFARI TRANSPORT**
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
**Tlf. 32 22 22**



*Halt* **sosialin**




# FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ

## Starvið sum stjóri á Hagstovu Føroya er leyst at søkja

Sambært lóg nr. 33 frá 7 mai 1991 um Hagstovu Føroya er Hagstovan høvuðsmyndugleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum.

Hagstova Føroya er ein sjálvstøðugur stovnur í Fíggjarmálastýrinum.

**Starvið sum stjóri**
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av stovninum.

**Høvuðsuppgávur stjórans sambært lógini**
Stjórin velur, raðfestir og fyriskipar arbeiðsuppgávurnar á hagstovuni sum eru
1. at savna, viðgera og almannakunngera hagtøl um samfelagsviðurskifti
2. at kunna átaka sær at savna, viðgera og almannakunngera hagtøl fyri kommunur, feløg, fyritøkur o.o.
3. at standa fyri ella vera við til at skipa og gagnnýta hagskráir hjá almennum myndugleikum, ið
4. verða nýttar í almennu fyrisitingini og í vinnuni, og sum kunnu nýtast til
5. hagfrøðiligt endamál
6. at kunna veita stuðul viðvíkjandi hagtølum til nevndararbeiði o.t.
7. at kunna gera hagfrøðiligar greiningar og forsagnir
8. hava altjóða hagtalssamstarv undir hond,
9. og annars standa fyri at útvega landsfyrisitingini og lóggávuvaldinum hagtøl.

**Førleikakrøv**
Prógv frá lærdum háskúla, cand. polit., cand oecon. ella líknandi.

Umsøkjarar eiga at vera førir fyri at orða seg væl bæði skrivliga og munnliga. Umráðandi er, at tann, ið settur verður, hevur evni at standa fyri verkætlanum og hevur leiðsluegінleikar. Dentur verður lagdur á eginleikar so sum evni at eggja og menna starvsfólkið, góð samstarvsevni, vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga fyri avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og er flokkað í 37. lønarflokki eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Tænastumannafelag landsins.

Setanarheitið er stjóri, og setanarøkið er Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí umfrамt løgmansskrivstovuna og hini aðalstýrini.

**Fleiri upplýsingar**
Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf 352020.

**Umsókn**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndir, avritum av prógvum og møguligum viðmælum verða at senda til:

**Fíggjarmálastýrið**
**Traðagøta 39**
**Postrúm 2039**
**FO-165 Argir.**

Umsóknir skulu vera Fíggjarmálastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2000 kl. 12.00.

# Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Umsóknir

**um stuðul frá norðurlendsku bókmenta- og bókasavnsnevndini til týðing av bókmentum hjá grannalondum, týðingarstudning og fólkbókasavnssamstarv**

Boðað verður við hesum frá, at vegleiðingarbløð og umsóknarbløð til stuðul frá noðurlendsku bókmenta- og bókasavnsnevndini (NORDBOK) til týðing av bókmentum hjá grannalondum o.ø. fáast við at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Føroya Landsbókasavn. Freistin at søkja fyrstu ferð í 2000 er **1. apríl 2000.**

Gjørt verður vart við, at allar umsóknir hesum viðvíkjandi skulu sendast skrivstovuni hjá NORDBOK og skulu sostatt stílast:

**NORDBOK**
**c/o. Biblioteksstyrelsen**
**Nyhavn 31 E**
**DK-1051 København K**


**Bilur til sølu**
Honda Civic 1400, silvurgráur, árg. mai 97, í sera góðum standi til sølu.
**Tlf. 218246**
**ella 441126 eftir kl. 18**


## Handverkaraeftirútbúgving fyri Radio-, EDV- og Elektroteknikkarar

Treytað av m.a. nóg stórari undirtøku, verða hesi skeið hildin:

**POWERSUPPLY/EMC**

Skeið I 27. til 31. mars 2000 (40 tímar) og Skeið II 3. til 7. apríl 2000 (40 tímar)

Luttakaragjald: kr. 5.950,00

Tilmelding: **áðrenn 22. mars 2000**

Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir nýggjari **reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadagfríggjadag, kl. 8-12 og 13-16).

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, Boks 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621

STARV sosialurin

# Grafikari til Sosialin

Søkt verður eftir grafikara til Sosialin at byrja 1. apríl ella skjótast tilber.

Umsøkjarar við grafiskari útbúgving og royndum innan blaðumbróting hava fyrimun.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag.

Umsókn, merkt grafikari, verður at senda til:

Sosialurin, box 76,
110 Tórshavn

Í seinasta lagi 20. mars.

*Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sosialin 311820 og spyrja eftir Torkil Johannesen.*

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Har starvast í dag umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. Á prentsmiðjuni, sum er partur av fyritøkuni, verða umframt Sosialin eisini prentað onnur bløð. Sosialurin umsetti í fjør fyri uml. 10 milliónir krónur. Á grafisku deildini starvast 7 fólk harav 2 lærlingar. Deildin er útgjørd við teimum mest framkomnu teldunum og forritunum innan tað grafiska.


**Bilur við skaða til sølu**
**(bilurin hevur verið á sjónum)**

**Merki:** Toyota Hi-Lux 2,4 Pickup
**Árg.:** 12/12-1996
**KM:** 46.661

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
tlf. 37 38 90 • fax nr. 37 31 17
at hitta millum kl. 08.00-10.00


**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17[00] til 23[00]

☎ 212380


*Lýsið í* **sosialinum**